# Christian Poulsen ársins leikari í Danmark



Um vikuskiftið skipaði Danmark Radio fyri stórum haldi, har teir sóu aftur á farna ítróttarkappingarár. Nógvir prísir blivu latnir á kvøldinum, samstundis sum gestirnir sóu nógvar av góðu hendingunum, sum donsk ítróttarfólk hava upplivað ígjøgnum júst farna árið. Ein av teimum, sum bleiv heiðraðu hetta kvøldið, var fótbóltsleikarin, Christian Poulsen. Annað árið á rað bleiv hann valdur til ársins fótbóltsleikara í Danmark frammanfyri góðar menn sum Thomas Kahlenberg, Daniel Agger og Jesper Christiansen. Tað vóru leikarar, sum valdu Christian Poulsen til ársins leikara.

# Kessler ársins ítróttarnavn

Størsti heiðurin ein ítróttaríðkari kann fáa í Danmark, er at vera valdur ársins ítróttarnavn. Á hátíðarhaldinum um vikuskiftið, sum Danmarks Radio skipaði fyri, bleiv ársins ítróttarnavn eisini valt, og á fyrsta sinni nakrantíð gjørdist ein boksari vinnari. Tað var nevniliga heimsmeistarin hjá bæði WBA og WBC, Mikkel Kessler, sum fór av stað við sigrinum. Mikkel Kessler er ósigraður í sínum fyrstu 37 dystum sum professionellur boksari, og hann bleiv ársins ítróttarnavn frammanfyri súkklaran Michale Rasmussen og liðið hjá FCK, sum hevur fingið so góð úrslit í Evropa.

VB-Kyndil 34-27 (17-11)

# VB vann trygt

**VB fekk eina góða byrjan uppá endaspælið í Sunset kappingini hjá kvinnum, tá tær vunnu tryggan sigur á heimavølli ímóti Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað var av alstórum týdningi fyri bæði liðini at vinna fyrsta dystin í endaspælinum, tá VB tók ímóti Kyndli í Vági. Vann VB dystin, so kundu tær leggja trýst á bæði Neistan og Stjørnuna, meðan ein sigur til Kyndil hevði lagt tær undir liðina á VB á triðja plássi.

### VB avgjørdi í fyrra hálvleiki

Tað var tó VB, sum var oman á at kalla allan dystin. Fyrstu løtuna fylgdust liðina hampiliga væl at, men síðstu 10 minuttirnar av fyrra hálvleiki lat VB ongan iva vera um, at tær ætlaðu at vinna dystin henda dagin. Hesa løtuna tóku tær avgerðandi frástøðu frá Kyndli, og tá liðini fóru til hálvleiks var støðan 17-11 til VB.

Ein av grundunum til, at VB fór so avgerðandi frá Kyndli hesa løtuna var, at VB valdi at fara út at mansverja Linu Andriulyte. Hetta gjørdi, at Kyndil hevði trupulleikar at fáa mál úti frá, og tað dugdu kvinnurnar hjá VB at gera sær dælt av.

### Kyndil nærkaðist

Í seinna hálvleiki byrjaði VB heldur betri, og eftir eina løtu høvdu tær økt um leiðsluna, soleiðis at heili 8 mál vóru á muni. So valdi Kyndil at fara út at mansverja bæði Daivu og Ivanu, og hetta vísti seg at geva VB smávegis trupulleikar fyrstu løtuna. Sum hálvleikurin leið minkaði Kyndil um munin, og tá 10 minuttir vóru eftir, vóru bara 4 mál á muni. Men síðstu 10 minuttirnar tók Asta í VB-málinum broddin av kyndlaálopinum, og nú byrjaðu ungu leikararnir hjá VB eisini at finna stevið í álopinum. Meðan bæði Daiva og Ivana blivu mansvardar bleiv betri pláss hjá ungu leikarunum, og hetta dugdu tær at taka nyttu av. M.a. gekst sera væl hjá Unu Egilsdóttir henda dagin, og hon fekk 5 mál.

Endaliga úrslitið av dystinum gjørdist 34-27 til VB, og sum heild hevði VB eisini fult tamarhald á dystinum. Við sigrinum hanga tær enn í hinum báðum oddaliðnum, meðan tað byrjar at síggja svart út hjá Kyndli at røkka heiðursmerkjaplássunum.



*VB vann tryggan sigur í fyrsta dystinum í endaspælinum, tá Kyndil var á vitjan.*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**FAKTA**

**VB-Kyndil 34-27 (17-11)**
**Málskjúttar:**
**VB:** Daiva Tuomaite 10 (2), Ivana Ljubicic 9 (2), Rannvá Johannessen 5, Una Egilsdóttir 5, Svava Vestergaard 3, Jóna Thorsteinson 2
**Kyndil:** Randi Wardum 8, Súsanna Petersen 6, Anja Heinadóttir 5, Lina Andriulyte 3, Ronja M. Mikkelsen 3 (2), Bjørg Syderbø 2
**Brotskøst:** VB 4, Kyndil 3
**Útvísingar:** VB 2, Kyndil 1
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

H71-Kyndil 30-28 (15-15)

# H71 úr botninum

**Unga H71-liðið fekk enn ein sigur í skjáttuna, tá teir vunnu á Kyndli um vikuskiftið. Við sigrinum eru teir nú bert tvey stig aftanfyri StÍF á 2. plássi**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað var av alstórum týdningi hjá bæði H71 og Kyndli at vinna fyrsta dystin í endaspælinum, tá hesi bæði liðini møttust í Hoyvíkshøllini. Bæði høvdu brúk fyri stigunum fyri at nærkast ovaru liðunum.

### Javnur fyrri hálvleikur

Heimaliðið byrjaði dystin væl betur. Teir løgdu hart út, og fyrsta korterið førdu teir við 2-3 mál. Hesa løtuna tóktust kyndilsleikararnir ikki heilt klárir, og hetta dugdu hoyvíkingarnir væl at revsa teir fyri. Um miðjan hálvleikin fekk Kyndil tó veruliga gongd á spælið, og ikki gekk long tíð, so høvdu teir lagt seg á odda. Hoyvíkingarnir vóru tó sera tendraðir henda dagin, og síðst í fyrra hálvleiki fingu teir aftur javnstøðu í, soleiðis at hálvleiksstøðan var 15-15.

### H71 stórum stíli

Í seinna hálvleiki byrjaði Kyndil betur, og legði seg á odda. H71 vildi tó ikki geva seg, og um miðjan hálvleikinum høvdu teir aftur fingið javnstøðu í, og eftir hetta settu teir veruliga ferð á. Frá at vera aftanfyri 19-21 skoraðu hoyvíkingar 7 ferðir á rað, so nú vóru teir knappliga frammanfyri 26-21. Hesa løtuna leikti H71 sera væl, meðan einki riggaði hjá Kyndli. Serliga Levi Nybo í H71-málinum tók fullkomiliga mótið frá kyndilsleikarunum.

Hetta gjørdist fyri so vítt eisini avgerðin uppá dystin. Nú vóru bert 10 minuttir eftir, og sjálvt um Kyndil megnaði at minka um munin, so vóru teir ongantíð nær við at fanga H71 aftur.

Endaliga úrslitið gjørdist 30-28 til H71, sum sostatt fekk eina góða byrjan uppá endaspælið. Fyri uttan Levi í málinum, so leikti Esbern Patursson ein sera góðan dyst, og hann fekk heili 11 mál.

**FAKTA**

**H71-Kyndil 30-28 (15-15)**
**Málskjúttar:**
**H71:** Esbern Patursson 11 (3), Poul K. Dam 6, Tróndur Vatnhamar 4, Niels V. Niclassen 3, Janus Sørensen 2, Gunnar Bláberg 2, Bjarni Sørensen 2
**Kyndil:** Hans Áki Dal Christiansen 9, Janus E. Sørensen 6, Høgni Klein 5 (2), Hjalti Jacobsen 3, Rókur Akralíð 2, Ragnar Stakksund 1, Hanus Johansen 1, Kenn Zachariassen 1
**Brotskøst:** H71 3, Kyndil 4
**Útvísingar:** H71 4, Kyndil 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen



*Esbern Patursson fekk 11 mál og var ein av mest eyðsýndu leikarunum hjá H71, tá teir vunnu á Kyndli í fyrsta dystinum í endaspælinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*